# Møguleikar í The Dreams

Chief 1 vil ikki lova nakað frambrot í Danmark, eftir at fløgan hjá The Dreams er komin út, men hann sær møguleikar. - Eg havi eina góða kenslu av hesari fløguni hjá The Dreams, og nú gleði eg meg mest av øllum til, at føroyingar, danir og allir norðurlendingar sleppa at hoyra fløguna. - Eg havi hug at síggja tað potentiali í The Dreams, sum mann hevur hug at síggja teimum. Eg síggi stórar møguleikar, og eg haldi eisini, at teir í bólkinum gera tað. Hinvegin sigi eg ofta við teir, at teir skulu njóta tónleikin, teir skulu tíma, og teir skulu kunna hyggja í spegilð aftaná, sigur Chief 1.
Mynd: Polfoto





*- Nú skilji eg eitt sindur betur, hvussu tað er at liva í einum fremmandum landi, har tú ikki skilir málið, tí tá teir í The Dreams tosa saman, so skilji eg ikki eitt petti. Við hvørt fái eg illgruna um, at teir garantera sita og baktala meg og siga alt møguligt ljótt um meg, sigur Chief 1 skemtandi*
*Mynd: Polfoto*

skilir málið, tí tá teir í The Dreams tosa saman, so skilji eg ikki eitt petti. Við hvørt fái eg illgruna um, at teir garantera sita og baktala meg og siga alt møguligt ljótt um meg, sigur hann skemtandi.

## Grand Prixið

The Dreams eru í ár við í danska Grand Prixnum, og tað er kanska ikki tað mest upplagda staðið at byrja hjá einum punkrockbólki, men Chief 1 heldur, at tað er gott fyri bólkin.

- Tá ið eg sá The Dreams spæla, so ynskti eg, at allir danir komu at hoyra teir og síggja, hvussu góðir teir eru. Og tað er ikki lætt, at koma burtur úr ongum við sínum egna tónleiki og koma út til nógv fólk eftir stuttari tíð. Tað er bara Grand Prixið eftir til tað, og tí valdu vit, at fara við í kappingina.

- Vit hava tosað nógv um luttøkuna í Grand Prixnum, og eg havi sagt við The Dreams, at teir skulu kunna standa inni fyri tí. Teir skulu varðveita sín stíl og sín tónleik, og so ber tað saktans til at verða við í Grand Prixnum. Og tað er júst tað, sum teir hava gjørt. Teir eru ikki ávirkaðir av Grand Prixnum, men hava sítt egna show og sín egna sang við í Grand Prixnum, og tað er týdningarmikið.

- Alt tað, sum The Dreams ger í løtuni, er nakað, sum teir sjálvir vilja. Eg eri bara við til at hjálpa teimum at náa eitt sindur longri, um eg á nakran hátt kann tað, sigur Chief 1

## Nýggj fløga á donskum

Tann 8. februar gevur The Dreams sína fyrstu fløgu út í Danmark. Talan er um rocktónleik, sum teir syngja á donskum, og tað er nakað nýtt fyri bólkin.

- Tá ið eg hitti The Dreams fyrstu ferð, so segði eg við teir, at tað kundi verið sera spennandi at hoyrt teir sungið á donskum. Fyrst grinu teir bara eftir mær, men teir vildu gjarna royna. Og tað er tað góða við The Dreams, teir eru ikki bangnir fyri at royna nakað nýtt.

- Tá ið eg hoyrdi Hans Edward syngja danskt fyrstu ferð, tá hugsaði eg, at hetta var nakað heilt serligt – hetta var feitt. Og so kann eg siga við allar føroyingar, sum halda at vit danir ganga og grína eftir tykkara dialekt: Tað verður skjótt in, at tosa soleiðis í Danmark.

- Eg haldi, at sangirnir á nýggju fløguni eru sera góðir og orginalir, og The Dreams ljóða framvegis sum The Dreams, hóast teir hava ment seg sum tónleikarar og hava funnið eina nýggja leið, sum teir vilja ganga. Eg havi ikki sagt teimum, hvussu teir skulu ljóða. Teir hava verið við í allari prosessini, og vit hava arbeitt saman um sangirnar og ljóðið á fløguni, sigur Chief 1.